# Viðtøkur fyri Tónleikasamband Føroya

**§ 1 Navn**

Navn felagsskapsins er "Tónleikasamband Føroya" - stuttstava TSF.

**§ 2 Skipan**

Stk. 1. TSF er meginfelag og landsfelag hjá tónlistafeløgunum í Føroyum, og samstundis hægsti felagskapur innan tónleikavirksemi, tað veri seg innan føroyska tónleikamentan- og siðaarv í breiðastu merking, framleiðslu og framførðslu v.m., og eru í løtuni hesir felagsskapir limir í sambandinum:

Kórsamband Føroya
Meginfelag fyri Føroysku Hornorkestur
Sláið Ring
Føroya Tónleikafelag
Organist felagið
Felagið Føroysk Tónaskøld
Framleiðarafelagið
Einleikara Felagið
Fólkatónleikarafelagið
Konsertfyriskipara felagið
Tónleikavinnu felagið
Musiklærarafelagið

Stk. 2. TSF er óheft av politiskum og átrúnaðarligum áhugamálum.
Stk. 3. TSF er skipað við aðalfundi sum hægsta myndugleika, síðani stravsnevnd og forfólki.

**§ 3 Endamál**

Endamálið hjá TSF er at røkja áhugamálini hjá tónleikavinnuni, og bøta um korini hjá føroyskum tónleiki á øllum stigum. Hetta verður gjørt við:
at umboða limir sambandsins mótvegis almennu myndugleikunum
at vekja og styrkja um áhugan fyri føroyskum tónleiki í almenna rúminum
at styrkja samstarvið millum ymsu greinirnar innan tónleikin

at ráðgeva og vegleiða limum sambandsins í dagliga virksemi teirra
at virka fyri og bøta um korini hjá limum sambandsins við at útvega fíggjarligt grundarlag fyri virksemi limanna.

**§ 4 Aðalfundurin**

Stk. 1. Aðalfundurin verður skipaður av 1-5 umboðum fyri hvønn lim sambandsins, og er ovasti myndugleiki sambandsins og verður hildin á einum staði, sum nevndin ásetur.
Stk. 2. Í seinasta lagi 8 dagar frammanundan hvørjum aðalfundi skal dagsskrá, tey fullfíggjaðu uppskotini, umframt ársroknskapur verða send limunum.
Stk. 3. Limir sambandsins hava rætt til at seta fram uppskot til aðalfundin og skullu hesi, fyri at kunna viðgerast á aðalfundinum, vera starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 20 dagar aðrenn aðalfundin.

**§ 5**

Stk. 1. Starvsnevndin boðar til aðalfund við tilskilan av tíð, stað og dagsskrá í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan við skrivliga at venda sær limir sambandsins á bústaði teirra. Miða verður eftir at aðalfundurin verðu hildin flaggdagin, ella í seinasta lagi 30. apríl.
Stk. 2. Um uppskot til broytingar av viðtøkum felagsins skulu viðgerast á aðalfundinum, skal høvuðsinnihaldið í uppskotinum verða lýst í innkallingini.

**§ 6**

Stk. 1. Aðalfundurin verður stýrdur av einum av starvsnevndini valdum fundarstjóra.
Stk. 2. Tað, sum fer fram á aðalfundinum, verður ført í gerðabók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum.

**§ 7**

Vanligur ársaðalfundur verður hildin á flaggdegnum. á hvørjum ári, men kan starvsnevndin áseta annan dag, tó ikki seinni enn 30. apríl mánaði við hesi dagsskrá:
1. Frásøgn forfólksins um virki sambandsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar,
3. Val av starvsnevnd
4. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
5. Møgulig fráboðað uppskot.
6. Ymiskt

**§ 8**

Stk. 1. Eykaaðalfundur verður hildin eftir avgerð frá einum aðalfundi, ella tá starvsnevndin ella grannskoðarin biður um hann.
Stk. 2. Afturat hesum kunnu í minsta lagi 1/5 av limunum sambandsins biðja um eykaaðalfund til viðgerð av einum serstøkum evni.
Stk. 3. Verður áheitan sett fram um at kalla inn til eykaaðalfundar, verður hesin at kalla inn í seinasta lagi 4 vikur eftir, at áheitan er latin sambandinum.

**§ 9**

Stk. 1. Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta, tó soleiðis, at í minsta lagi helmingurin av limunum eru til staðar, og hevur hvør limur eina atkvøðu.
Stk. 2. Til at samtykkja uppskot til broytingar av viðtøkum sambandsins, krevst tó, at í minsta lagi 2/3 av limunum eru umboðaðir, og má viðtøka vera samtykt við minst 2/3 av greiddum atkvøðum.
Stk. 3. Til at samtykkja avtøku av sambandinum, krevst tó, at samtyktin er gjørd av tveimum ársaðalfundum og skulu í minsta lagi 2/3 av limunum vera møttir, og má viðtøka vera samtykt við minst 2/3 av greiddum atkvøðum á báðum fundunum.
Stk.4. Verður felagið avtikið verða møguligar ognir hjá sambandinum lutaðar felagsskapinum Barnabata.
Stk. 5. Øll atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, uttan so at fundurin velur annan atkvøðugreiðsluhátt.

**§ 10 Starvsnevndin**

Stk. 1. Í starvsnevndina verða valdir 5 nevndarlimir og 2 tiltakslimir. Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár í senn, har av trý verða vald stakár og tvey verða vald makaár. Tiltakslimir vera valdir á hvørjum ári. Nevndin skipar seg sjálv við forfólki, næstforfólki og kassameistara. Afturval loyvist.

Stk. 2. Starvsnevndin kann seta neyðugt fólk í starv, og kann seta undirnevndir at viðgera ávís av starvsnevndini tilskila mál.

Stk. 3. Samskiparin, sum er settur í starvi hjá TSF, kann ikki vera nevndarlimur sambandsins samstundis. Hetta fyri at verja bæði TSF og viðkomandi, sum er samskipari. Eitt nú skal nevndin avgera løn til samskipara, uppgávur og endamál.

**§ 11**

Stk. 1. Nevndin hevur fund so ofta forfólkið heldur tað vera neyðugt ella um ein av hinum limunum ynskir tað.

Stk. 2. Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so at í minsta lagi 2/3 av nevndarlimunum eru á fundi.

Stk. 3. Stendur á jøvnum undir atkvøðugreiðslu í nevndini, er forfólksins atkvøða avgerandi.

Stk. 4. Til tess at virka fyri og bøta um korini hjá limum sambandsins við at útvega fíggjarligt grundarlag fyri virksemi limanna, skal nevndin á hvørjum ári hjá limum sambandsins kanna virksemi og tørvin fyri fíggajarligum ískoyti til virksemi, og taka upp samband við almennu myndugleikarnar, og aðrar myndugleikar og stovnar til tess at ætlaða virksemi kann fara framm.

**§ 12 Tekningarreglur**

Stk. 1. Sambandið verður bundið av forfólki sambandsins, saman við einum nevndarlimi, ella av allari starvsnevndini.

Stk. 2. Nevndin hevur heimild at geva fulltrúarumboð.

**§ 13 Roknskaparár- og reglur**

Stk. 1.Roknskaparár hjá sambandinum er almannakkaárið.

**§ 14**

Stk. 1. Starvsnevndin skal ansa eftir, at ognir sambandsins verða neyðturviliga umsitnar og standa soleiðis, at tær eru til mest gagn fyri felagsskapin, og soleiðis, at sambandið altíð kann halda sínar skyldur.

Viðtøkurnar fyri Tónleikasamband Føroya - stuttstava TSF vóru samtyktar 1. mars 2023.
Broytingar í viðtøkunum vóru lagdar framm fyri limafeløgunum á ársaðalfundi, 07.04.25 og samtyktar av limafeløgunum 07.04.25.
Seinast broyttar og samtyktar á ársaðalfundi, tann 15.apríl í 2026